


*Valplakatir á Vaglinum í Havn í steytiárunum. Tá varð meira gjørt burtur úr at tekna skemtiligar valplakatir – og var John Smith, sáli, á Argjum fastur fúsur at tekna fyri Javnaðarflokkin*

Tjóðveldisflokkurin væl størstur í Suðurstreymi. Hann fekk sjey hundrað atkvøður fleiri enn næstu kappingarneytarnir.

Høgni Hoydal einsamallur lyfti flokkin so høgt. Hann fekk 1.561 persónligar atkvøður. Tað er hægsta talið, sum nakar nakrantíð hevur fingið. Hetta var fyrsta ferðin, at flokkurin fekk trý umboð í Suðurstreymi, og tey vórðu øll umdømisvald.

Tjóðveldisflokkurn var størstur í 1970, og tað vóru eisini nógvar tjóðveldisatkvøður í 1974. Ta ferðina stillaði Zacharias Wang saman við øðrum upp á uttanflokka lista. Rættarmál spurdist burturúr, tí tjóðveldislistin vildi ikki vita av hesum listanum. Dómarin dømdi Zacharias og hinar á lista G, sum hann varð nevndur, at vera tjóðveldismenn.

Erlendur Patursson var høvuðsvalevni hjá flokkinum í høvuðsstaðnum frá 1970 og inntil hann doyði. Frammanundan hevði Hanus við Høgadalsá verið høvuðsvalevni. Eisini abbi Høgna Hoydal, Karsten Hoydal, umboðaði tjóðveldisflokkin í Suðurstreymi.

Karin Kjølbro var fyrsta kvinna, sum varð vald á ting. Tað var í 1978, tá hon og Jona Henriksen, sum umboðaði Javnaðarflokkin vórðu valdar í Suðurstreymi.

Finnbogi Ísakson varð fyrstu ferð valdur í Norðoya valdømi í 1966. Eftir at hann hevði verið úr politikki í fýra ár, varð hann í 1988 uppstillaður í Suðurstreymi, og hann hevur við undantak av stuttum skifti sitið í tinginum síðani tá.

Hesa ferð er Finnbogi Ísakson ikki á listanum. Spurningurin er so, hvørji skulu í løgtingið fyri Tjóðveldisflokkin saman við Høgna Hoydal. Tað eru nógv um boðið, og tað er neyvan nakað at ivast í, at tað verður heilt tætt millum fleiri av valevnunum.

## SUÐURSTREYMOYAR VALDØMI

**1966 (A, B, C og E umdømisvaldar)**

| | |
|---|---|
| Fólkaflokkurin | 1.245 |
| Knút Wang | 444 |
| Peter Christiansen (eyka) | 235 |
| Sambandsflokkurin | 1.179 |
| Trygve Samuelsen | 551 |
| Peter F. Christiansen (eyka) | 103 |
| Javnaðarflokkurin | 978 |
| Martin Joensen | 234 |
| Sjálvstýrisflokkurin (eyka) | 315 |
| Hilmar Johansen | 77 |
| Tjóðveldisflokkurin | 1.117 |
| Hanus við Høgadalsá | 421 |
| Karsten Hoydal (eyka) | 160 |
| Framburðsflokkurin (eyka) | 243 |
| Kjartan Mohr | 201 |
| | **5.077** |

**1970 (A, B, C og E umdømisvaldar)**

| | |
|---|---|
| Fólkaflokkurin | 1.197 |
| Sigfried Skaale | 304 |
| Knút Wang (eyka) | 260 |
| Sambandsflokkurin | 1.091 |
| Trygve Samuelsen | 380 |
| Javnaðarflokkurin | 1.097 |
| Jacob Lindenskov | 346 |
| Sjálvstýrisflokkurin (eyka) | 344 |
| Hilmar Kass | 134 |
| Tjóðveldisflokkurin | 1.247 |
| Erlendur Patursson | 782 |
| Hanus við Høgadalsá (eyka) | 150 |
| Framburðsflokkurin (eyka) | 364 |
| Kjartan Mohr | 295 |
| | **5.340** |

**1974 (A, B, C og E umdømisvaldar)**

| | |
|---|---|
| Fólkaflokkurin | 1.289 |
| Óli Breckmann | 349 |
| Eliesar Arge (eyka) | 238 |
| Sambandsflokkurin | 1.077 |
| Pauli Ellefsen | 242 |
| Javnaðarflokkurin | 1.293 |
| Jacob Lindenskov | 477 |
| Sjálvstýrisflokkurin (eyka) | 460 |
| Hilmar Kass | 247 |
| Tjóðveldisflokkurin | 1.197 |
| Erlendur Patursson | 533 |
| Tjóðveldisflokkurin II | 487 |
| Framburðsflokkurin (eyka) | 317 |
| Kjartan Mohr | 227 |
| | **6.120** |

**1978 (A (2), B (2), C (2) og E (2) umdømisvaldar)**

| | |
|---|---|
| Fólkaflokkurin | 1.532 |
| Jógvan Sundstein | 530 |
| Óli Breckmann | 469 |
| Sambandsflokkurin | 1.753 |
| Pauli Ellefsen | 770 |
| Eilif Samuelsen | 105 |
| Javnaðarflokkurin | 1.426 |
| Jacob Lindenskov | 329 |
| Jona Henriksen | 228 |
| Sjálvstýrisflokkurin (eyka) | 480 |
| Hilmar Kass | 232 |
| Tjóðveldisflokkurin | 1.648 |
| Erlendur Patursson | 542 |
| Karin Kjølbro | 266 |
| Framburðs– og Fiskivinnuflokkurin (eyka) | 438 |
| Kjartan Mohr | 103 |
| | **7.277** |

**1980 (A (2), B (2), C, D og E (2) umdømisvaldar)**

| | |
|---|---|
| Fólkaflokkurin | 1.614 |
| Jógvan Sundstein | 545 |
| Óli Breckmann | 501 |
| Sambandsflokkurin | 1.624 |
| Pauli Ellefsen | 745 |
| Eilif Samuelsen | 221 |
| Javnaðarflokkurin | 1.361 |
| Jacob Lindenskov | 378 |
| Jóannes Dalsgaard (eyka) | 219 |
| Sjálvstýrisflokkurin | 721 |
| Hilmar Kass | 382 |
| Tjóðveldisflokkurin | 1.421 |
| Erlendur Patursson | 364 |
| Karin Kjølbro | 262 |
| Framburðs– og Fiskivinnuflokkurin (eyka) | 655 |
| Juul Jacobsen | 144 |
| | **7.396** |

**1984 (A (2), B (2), C (2) og E (2) umdømisvaldar)**

| | |
|---|---|
| Fólkaflokkurin | 2.111 |
| Jógvan Sundstein | 842 |
| Óli Breckmann | 571 |
| Poul Michelsen (eyka) | 318 |
| Sambandsflokkurin | 1.597 |
| Pauli Ellefsen | 829 |
| Eilif Samuelsen | 131 |
| Javnaðarflokkurin | 1.740 |
| Jacob Lindenskov | 444 |
| Jóannes Dalsgaard | 233 |
| Sjálvstýrisflokkurin (eyka) | 746 |
| Hilmar Kass | 370 |
| Tjóðveldisflokkurin | 1.611 |
| Erlendur Patursson | 379 |
| Karin Kjølbro | 310 |
| Kristiligi Fólkaflokkurin (eyka) | 519 |
| Tordur Niclasen | 174 |
| | **8.324** |

**1988 (A (3), B (2), C (1) og E (2) umdømisvaldar)**

| | |
|---|---|
| Fólkaflokkurin | 2.843 |
| Jógvan Sundstein | 1001 |
| Óli Breckmann | 670 |
| Poul Michelsen | 560 |
| Sambandsflokkurin | 1.889 |
| Pauli Ellefsen | 1037 |
| Eilif Samuelsen | 167 |
| Javnaðarflokkurin | 1.863 |
| Marita Petersen | 385 |
| Jacob Lindenskov (eyka) | 241 |
| Sjálvstýrisflokkurin (eyka) | 550 |
| Torbjørn Poulsen | 129 |
| Tjóðveldisflokkurin | 2.109 |
| Jóngerð Purkhús | 617 |
| Karin Kjølbro | 504 |
| Kristiligi Fólkaflokkurin | 361 |
| Tordur Niclasen | 138 |
| Framsóknarflokkurin | 220 |
| Uttanflokka | 13 |
| | **9.848** |

**1990 (A (2), B (2), C (2), D og E umdømisvaldar)**

| | |
|---|---|
| Fólkaflokkurin | 2.432 |
| Jógvan Sundstein | 850 |
| Óli Breckmann | 461 |
| Birgir Danielsen (eyka) | 279 |
| Sambandsflokkurin | 1.678 |
| Lisbeth L. Petersen | 539 |
| Finnbogi Arge | 254 |
| Javnaðarflokkurin | 2.597 |
| Atli P. Dam | 1356 |
| Marita Petersen | 524 |
| Sjálvstýrisflokkurin | 921 |
| Helena Dam á Neystabø | 364 |
| Tjóðveldisflokkurin | 1.294 |
| Finnbogi Isaksen | 407 |
| Kristiligi Fólkaflokkurin | 327 |
| Sosialistiski Loysingarflokkurin | 460 |
| | **9.784** |

**1994 (A (2), B (3), C, E og G umdømisvaldar)**

| | |
|---|---|
| Fólkaflokkurin | 1.384 |
| Óli Breckmann | 509 |
| Bjarni Djurholm | 166 |
| Sambandsflokkurin | 2.177 |
| Bjørn á Heygum | 648 |
| Lisbeth L. Petersen | 370 |
| Finnbogi Arge | 210 |
| Javnaðarflokkurin | 1.168 |
| Marita Petersen | 595 |
| Sjálvstýrisflokkurin (eyka) | 488 |
| Helena Dam á Neystabø | 207 |
| Tjóðveldisflokkurin | 1.131 |
| Finnbogi Ísakson | 221 |
| Kristiligi Fólkaflokkurin | 167 |
| Miðflokkurin (eyka) | 520 |
| Jenis av Rana | 237 |
| Verkamannafylkingin | 1.120 |
| Kristian Magnussen | 565 |
| Føroyski flokkurin | 320 |
| Frælsisfylkingin | 315 |
| | **8.790** |

**1998 (A (2), B, C (2), E (3) umdømisvaldar)**

| | |
|---|---|
| Fólkaflokkurin | 2.072 |
| Óli Breckmann | 632 |
| Bjarni Djurholm | 585 |
| Sambandsflokkurin | 1.673 |
| Lisbeth L. Petersen | 644 |
| Heðin Mortensen | 201 |
| Javnaðarflokkurin | 2.072 |
| Kristian Magnussen | 705 |
| Katrin Dahl Jakobsen | 167 |
| Sjálvstýrisflokkurin (eyka) | 659 |
| Helena Dam á Neystabø | 327 |
| Tjóðveldisflokkurin | 2.765 |
| Høgni Hoydal | 1.561 |
| Annita á Fríðriksmørk | 379 |
| Finnbogi Ísakson | 199 |
| Kristiligi Fólkaflokkurin | 82 |
| Miðflokkurin (eyka) | 478 |
| Jenis av Rana | 258 |
| Verkamannafylkingin | 90 |
| | **9.891** |





*Tey telja atkvøður í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn. Síðani 1988 hevur ítróttarhøllin verið valstað í Havn*

### Hilmar sterkur

Sjálvstýrisflokkurin hevði ikki havt tað gott í høvuðsstaðnum, tá Hilmar Johansen í 1966 varð uppstillaður og valdur. Hann var einasta umboðið fyri flokkin, og tískil gjørdist hann beinanvegin floksformaður.

Hilmar Kass, sum hann nøkur ár eftir fyrstu ferð at vera valdur broytti eftirnavnið til, varð afturvaldur á øllum valunum, inntil hann ikki stillaði uppaftur í 1988. Atkvøðutalið hjá Sjálvstýrisflokkinum í Suðurstreymi øktist støðugt hesi árini. Tá Hilmar legði frá sær fór flokkurin tvey hundrað atkvøður aftur – til 550.

Í 1990 kom Helena Dam á Neystabø sum eitt stjørnuskot upp á listan, og hon varð afturvald í 1994 og í 1998. Hesa ferð eru hvørki Helena ella Jákup Sverri Kass, sum hevði næstflestar atkvøður í 1998, á listanum. Tí skal nýggjur sjálvstýristingmaður veljast í høvuðsstaðnum – um tað eydnast flokkinum at vinna inn um tinggátt, og um tað eyndast teimum í Suðurstreymi at fáa fleiri atkvøður enn sjálvstýrisatkvøðurnar í Norðoya og Eysturoyar valdømum.

Valini nógvu tær seinastu ferðirnar hava víst, at veljarafjøldin í Havnini og Suðurstreymi fjakkar. Tað eru nógvir marginalveljarar. Týsdagin fæst at vita, um atkvøðubýtið hesa ferð verður tað sama, sum tað var fyri fýra árum síðani, ella um onkur annar flokkur fer at taka oddin frá Tjóðveldisflokkinum. Síðstu fjórðingsøldina hevur tað næstan verið siðvenja, at tað hevur verið vaktarskifti á toppinum fjórða hvørt ár!



*Valstríð í sjónvarpinum í 1988. Á røðarapallinum sæst Jørgen Thomsen, sáli, sum umboðaði Javnaðarflokkin í Eysturoyar valdømi frá 1978 til 1994*

# Vit betala ikki løn til fólk í verkfalli



*– Tað kemur ikki uppá tal a betala fólki í verkfalli, løn, sigur Karsten Hansen*

**Málið er púra einfalt: Skiparar og stýrimenn hjá Strandferðsluni fáa løn fyri tað, teir sigla, sigur Karsten Hansen**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

– Skiparar og stýrimenn hjá Strandferðsluni fáa ikki fulla løn fyri at vera tøkir bara til sjúkraflutning.

Karsten Hansen, Landsstyrismaður í Fíggjarmálum, er púra greiður: Hann fer ikki at ganga krøvunum frá Skipara- og Navigatørfelagnum á møti um, at skiparar og stýrimenn skulu fáa fulla løn fyri at vera tøkir til sjúkraflutning, hóast verkfall er og skipini annars liggja.

Karsten Hansen sigur, at málið er sera einfalt: Menninir fáa løn fyri tað, teir sigla. Sigla teir eftir ferðaætlanini sum vanligt, fáa teir løn, sum vanligt. Sigla teir við sjúklingum, fáa teir løn fyri tað. Tvs, at teir fáa fulla løn fyri túrin, teir sigla við sjúkraflutningi. Men teir fáa ikki fulla løn fyri at vera í verkfalli og bara sigla við sjúklingum, sigur Karsten Hansen.

Hann sigur, at tað er fastar mannagongdir fyri, hvussu farast skal fram í hesum máli og tað er, at menninir fáa gjald fyri tilkalling, tá ið teir ikki sigla og tað fáa teir eisini í hesum føri.

– Vilja teir hava fulla løn hóast teir eru í verkfalli, mugu teir fáa onkran annan at gjalda, tí tað verða ikki vit. Tað kemur ikki upp á tal.

– Skulu fólk hava fulla løn, imeðan tey erui verkfalli, er ongin orsøk at kom aftur til arbeiðis yvirhøvur.

Hann vísir á, at tað eru Skipara- og Navigatørfelagið, sum er í verkfalli og heldur sjúkraflutningurin uppat, er ábyrgdin teirra.

Tó væntar Landsstýrismaðurin ikki, at teir fara at nokta at sigla, skuldi tað veruliga staðið á.

– Eisini teir skulu liva við sínari samvitsku eftir hetta og higartil hava partarnir á arbeiðsmarknaðinum hildið seg frá at tikið sjúk fólk til gísla, so tað vænti eg ikki, sigur Karsten Hansen.

### 56 sáttmálar og fimm verkføll

Karsten Hansen sigur, at sum landsstýrismaður hevur hann verið við til at gera heilar 56 sáttmálar við 31 fakfeløg.

– Fimm ferðir eru feløg farin í verkfall. Av teimum hevur Skipara- og Navigatørfelagið verið í verkfalli tríggjar ferðir. Hini 30 feløgini hava sostatt bert verið í verkfalli tvær ferðir. So kann ein og hvør gera sær sínar metingar, sigur Karsten Hansen.